## Trivnaður og arbeiðsgleði

Jóhanna Andreasen og Bergtóra Høgnadóttir Joensen skipa fyri tveimum fyrilestrum undi heitinum “trivnaður og arbeiðsgleði fyri øll” í januar. Fyrri fyrilesturin verður í annaðkvøld kl.19.30 á Margarinfabrikkini í Tórshavn. Seinni fyrilesturin verður hósdagin kl.19.30 í Virkishúsinum í Klaksvík . Jóhanna og Bergtóra starvast báðar sum HR-mennarir í Eik, men tær skipa eisini fyri fyrilestrum og undirvísing sum hava við starvsfólkaviðurskifti og trivna at gera. Høvi verður at seta spurningar og kjakast um evni.



## Tjenar meir enn Putin

Jóannes Eidesgaard tjenar meiri enn russiski forsetin Vladimir Putin. Tað vil ein listi, sum kenda amerikanska blaðið Forbes hevur gjørt, vera við. Dimmalætting, sum hevur Forbes sum keldu, skrivar, at russiski forsetin Vladimir Putin tjenar 500.000 krónur um árið, men Jóannes Eidesgaard tjenar 700.000 krónur. Altso 200.000 krónur meiri enn russiski forsetin. Sambært hesum sama lista, er Lee Hsien Loong, forsætisráðharri í Singapore, er ovast á listanum við eini árslønáljóðandi 11 milliónir krónur. Niðast á listanum og tann ríkisleiðarin við minst løn er Evo Morales í Bolivia. Hann fær einans 100.000 krónur um árið.



*Syðri partur av nýggja skúlanum í Runavík er nú liðugur. Talan er um einar 1500 fermetrar av sløkum 5.000 fermetrum, sum samlaða byggingin fevnir um*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Nýggjur skúlabygningur í Runavík

**- Hølini eru ljós og nosslig, og ljóðviðurskiftini eru framúr góð. Tað eru vit øll samd um, sigur deildarleiðarin í Runavík, Ingvard Lamhauge**

SKÚLABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár var fyrsti skúladagur hjá umleið 150 framhaldsskúlanæmingum í tí partinum av nýggja skúlanum í Runavík, sum nú er liðugur.

Tá ið tú sært inn á skúlaøkið, er ikki lætt at síggja, at nøkur skúlagongd er her. Økið líkist einum byggiplássi, og tað er tað eisini, tí samlaða verkætlanin er rættiliga umfatandi. Men tá ið tú kemur suður í syðra enda, sært tú skjótt, at hesin parturin nú stendur liðugur.

Átta skúlastovur eru lidnar, trý bólkarúm, eins og rúmligur og væl útgjørdur skúlakøkur og stovur til træ-og maskinlæru. Enn er allur útbúnaðurin ikki komin upp á pláss, men tað kemur hann, sum dagarnir ganga.

Tann parturin, sum nú stendur liðugur og er tikin í nýtslu, er soleiðis tann sunnasti parturin av skúlabygginini.

Talan er um einar 1500 fermetrar tilsamans av sløkum 5.000 fermetrum, sum samlaða byggingin fevnir um.



*- Vit eru øll sera væl nøgd við nýggja skúlabygningin, sigur Ingvard Lamhauge, deildarleiðari*



*Ólavur Magnussen, lærari, undirvísir í støddfrøði, meðan vit vitja. Nýggju talvurnar eru ein fongur fyri undirvísingina*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Sera væl nøgd

Bæði lærarar og næmingar eru sera væl nøgd við hendan fyrsta partin av skúlanum í Runavík.

Á stuttari vitjan í skúlanum í gjár, vísti Ingvard Lamhauge, deildarleiðari, okkum snotuligu hølini, sum nú standa liðug.

Høgt er til loft, og vítt er til veggja.

- Hølini eru ljós og nosslig, og ljóðviðurskiftini eru framúr góð. Tað eru vit øll samd um, sigur deildarleiðarin.

Inni í skúlastovunum var stórur áhugi fyri nýggju og talgildu talvunum, og bæði lærarar og næmingar vístu okkum mongu og ymisku møguleikarnar við hesum talvum.

### Nógvir møguleikar

Við nýggju talvunum er kritið farið í søguna.

- Hvør einstøk talva er sett í samband við eina teldu, sum hevur netsamband. Forritini kunnu veljast á telduni sjálvari, við mús ella við at nerta við valmøguleikarnar á myndini, sum tú hevur uppi á talvuni.

Tá ið vit vitjaðu, vóru vit eitt nú inni á gólvinum í skúlastovuni, har Ólavur Magnussen, lærari, undirvísti nøkrum næmingum í støddfrøði.

- Um tú vilt, kanst tú goyma alt, tú skrivar upp á talvuna, antin tað er á telduni – ella við “penninum”. Í øðrum lærugreinum kanst tú leita eftir tilfari á netinum og taka hetta fram á talvuni. Møguleikarnir eru næstan óavmarkaðir, siga bæði lærarar og næmingar.

### Ljós og lyklar

Ljósini í nýggja skúlanum slókna av sær sjálvum, tá ið einki rørist í rúminum - og tey tendra aftur, tá ið tú kemur gangandi eftir gongini. Tað eru soleiðis sensorar sum – eftir rørslum í rúminum - stýra, nær ljósini brenna, og nær tey eru sløkt.

Meðan vit vitjaðu, vísti Ingvard Lamhauge okkum eisini lyklarnar til ymisku rúmini, sum eru forritaðir til ymisku stovurnar.

- Tú nertir bara lykilin við “lyklarholið”, so fer hurðin upp, sigur hann.

Í nýggja skúlabygninginum eru eisini væl skipaði goymslurúm til skúlabøkur.

Eingin gongur inni í skóm, og hetta kemur eisini at gera, at hølini altíð eru rein og nosslig.

Í eini aðrari grein fara vit at venda aftur til hesa stórfingnu skúlabygging í Runavík.